Helgi Abrahamsen
løgtingsmaður

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg

um broyting í løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli
(Heimild til kommunur at seta upp vakmyndatól)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 178 frá 17. desember 2020 um yvirvøku við vakmyndatóli verða gjørdar hesar broytingar:

1. Aftaná § 3 verður sett:
"**§ 3 a.** Eitt kommunustýri kann, í samráð við politiið, og við tí endamáli at økja um trygdina, yvirvaka gøtu, veg, pláss ella líknandi øki, sum verður nýtt til vanliga ferðslu, og sum liggur nærindis matstovum o.l.

Stk. 2. Politiið kann gera av, at yvirvøka sbrt. stk. 1 ikki kann fara fram, ella at ætlaða yvirvøkan kann byrja seinni enn upprunaliga ætlað, tá hetta er neyðugt við atliti at virkseminum hjá politinum."

2. Í § 5 verður "sbrt. §§ 3 og 4," broytt til:"sbrt. §§ 3-4".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

Endamálið við uppskotinum er at heimila kommunustýrum at fremja yvirvøku í náttarlívinum, tá hetta verður mett at vera neyðugt. Tórshavnar kommuna hevur í fleiri førum víst á tørvin á at seta vakmyndatól upp í náttarlívinum í Havn. Dátueftirlitið kom í 2022 til ta niðurstøðu, at kommunur ikki høvdu heimild til at seta upp vakmyndatól. Uppskotssetarin metir tað vera neyðugt at fáa hesa heimild til vegar, og tí verður uppskotið lagt fyri Løgtingið.

Skotið verður upp at geva kommunum heimild til, í samráð við politiið, at seta vakmyndatól upp á økjum nærindis matstovum, skeinkistøðum, diskotekum, hotellum og øðrum støðum, ið eru umfatað av løgtingslóg um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi. Endamálið við hesum er at økja um tryggleikan hjá fólki, ið ferðast á hesum støðum.

Í mai 2024 samtykti Løgtingið eitt uppskot til samtyktar um at heita á landsstýrismannin í lógarmálum um at fyrireika og leggja fyri Løgtingið lógaruppskot um at loyva kommunum at seta upp vakmyndatól (løgtingsmál 69/2023).

Av tí, at landsstýrismaðurin ikki legði nakað uppskot fyri tingið samsvarandi løgtingssamtyktini, legði undirritaði uppskotssetari í vár lógaruppskot fyri tingið um at heimila kommunum at seta upp vakmyndatól (løgtingsmál 99/2024).

Landsstýrismaðurin upplýsti í sambandi við viðgerðina av tí málinum, at hann fór at leggja uppskot um at broyta vakmyndatólslógina fyri tingið eftir ólavsøku 2025. Enn er einki uppskot lagt fyri tingið, og tí verður hetta uppskotið lagt fram aftur.

Ummæli

Lógaruppskotið hevur ikki verið til ummælis.

Avleiðingarnar av uppskotinum

Uppskotið hevur fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar í tann mun, at tær velja at seta upp vakmyndatól. Roknast kann við, at tað serliga verða tær størru kommunurnar, ið fara at nýta heimildirnar í lógini, og tí verða tað hesar kommunurnar, ið fara at merkja fíggjarligu og umsitingarligu avleiðingarnar av uppskotinum.

Aðrar avleiðingar

Lógaruppskotið er í samsvari við EMRS. Sambært grein 8 í EMRS hava øll rætt til, at privatlív og familjulív verða vird. Løgtingslógaruppskotið hevur við sær, at tað í ávísum førum verður heimilað kommunum at yvirvaka við vakmyndatóli á almennum støðum. Mett verður tó, at orsøkin til yvirvøkuna (m.a. fyribyrging av lógarbrotum og tryggleiki) og kravið um skelting hava við sær, at í tann mun yvirvøka verður mett sum eitt inntriv í rættin til privatlív, er hetta eitt inntriv, sum er sakligt og lýkur lutfalsmeginregluna, og sum verður mett neyðugt.

Serligar viðmerkingar

Til § 1, nr. 1

§ 3 a, stk. 1 heimilar kommunustýrum í samráð við politiið at seta upp vakmyndatól við tí fyri eyga at økja um trygdina í ávísum økjum í kommununi. Talan er um eina heimild og ikki eina skyldu, og tað er upp til einstaka kommunustýrið, um tað ynskir at nýta heimildina.

Tað er ein treyt, at endamálið við yvirvøkuni er at skapa tryggleika. Heimilað verður einum kommunustýri at seta upp vakmyndatól í økjum, har mett verður, at trygdarskapandi tiltøk eru neyðug vegna harðskap, ófrið, herverk o. tíl. Tað vil siga, at fortreytin er, at kommunan metir, at yvirvøka við vakmyndatóli økir um trygdina hjá teimum borgarum, ið ferðast í økinum.

Tað er ein treyt, at økið, har yvirvakað verður, liggur nærindis einum øki við matstovum o. tíl. Nærindis skal í hesum sambandi skiljast sum innanfyri 100 metrar. Matstovur o. tíl. skal skiljast sum matstovur, skeinkistøð, diskotek, hotell o.a. ið eru umfataði av løgtingslóg nr. 183 frá 21. desember 2018 um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi.

Avgerðin hjá kommununi skal takast í samráð við politiið, og hetta merkir ítøkiliga, at kommunan skal biðja politiið um ummæli, áðrenn avgerðin verður tikin. Hetta er grundað á, at politiið má metast at hava vitan um, hvar tørvur er á yvirvøku við tí endamáli at skapa tryggleika.

Heimildin er avmarkað til bert at umfata øki, ið verða nýtt til vanliga ferðslu sbrt. § 2 í løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli.

Sambært § 7, stk. 3 í løgtingslógini um yvirvøku við vakmyndatóli kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um skelting, og hendan heimildin verður eisini galdandi fyri vakmyndatól, ið kommunurnar seta upp sambært § 3 a.

Sambært § 9, stk. 2 í løgtingslógini um yvirvøku við vakmyndatóli er álagt teimum, sum seta upp vakmyndatól, at boða Dátueftirlitinum frá. Manglandi fráboðan kann verða revsað við sekt.

Í stk. 2 verður ásett, at politiið kann nokta eini kommunu at seta upp vakmyndatól ella biðja kommununa útseta at seta tólini upp. Treytin er, at tað eftir eini ítøkiligari politifakligari meting er neyðugt við atliti at virkseminum hjá politinum. Talan er um støður, har yvirvøka, framd av kommununi, kann órógva eitt ítøkiligt mál hjá politinum, ella forða fyri, at politiið annars fær gjørt sítt arbeiði.

Til § 1, nr. 2
Talan er um eina fylgibroyting ið hevur við sær, at uppreksanin í § 5 eisini fevnir um § 3 a. Ásetingin í § 5 hevur við sær, at øll yvirvøka, ið ein kommuna fremur, skal fylgja reglunum í løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Á Løgtingi, 1. oktober 2025

Helgi Abrahamsen
løgtingsmaður